| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 25. apríl 2019 |
| Býráðsfundur nr. | 03/2019 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Marin Sólheim Thomsen |
| | |

Ár 2019 tann 25. apríl kl. 19.00 varð býráðsfundur hildin í ovara sali í Mentanarhúsinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 16.apríl 2019 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Eivin Breiðaskarð
Kristian Petersen
Ólavur Larsen
Árant Berjastein
Magni Herason Jøkladal
Sigurð S. Simonsen
Eyðun á Lakjuni
Edva Jacobsen

**Skrivari:** Marin Sólheim Thomsen, fíggjarleiðari

## Mál nr. 10/2019.
## Mál viðvíkjandi roknskapi kommununar fyri 2018.

Fuglafjarðar kommuna hevur tann 08. apríl 2019 móttikið grannskoðaðan roknskap fyri kommununa og grannskoðarafrágreiðing 10. apríl s.á. fyri 2018 frá Januar – løggilt grannskoðaravirki, undirskrivaður av Jógvani Amonsyni, statsaut. revisor og annars grannskoðaður av Snorra á Bøgarði, skrásettum grannskoðara.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 12. apríl 2019 gjøgnumgingið roknskapin og grannskoðarafrágreiðingina saman við fíggjarleiðaranum Marini S. Thomsen og samanhildið roknskaparøkini saman við fíggjarætlan kommununar fyri 2018.

Býráðið hevur í árinum framt 7 eykajáttanir harav 6 eru beinleiðis eru fíggjaðar við meirinntøkum av kommunuskatti og P/F skatti 2.009.000,00, meðan ein er fíggjað av innistandandi peningi kr. 3.000.000,00 til byggibúning av útstykkingini við Bøveg.

Talan er um samlaðar eykajáttanir upp á tilsamans kr 5.009.000,00, harav 4 av eykajáttanum eru til íløgur og 3 til rakstur. Eykajáttarnirnar eru útgreinaðar á hjáløgdu uppgerð frá fíggjardeildini, dagfest 30. januar 2019, og sum víst verður niðanfyri:

| Dato: | Íløgutekstur: | Upphædd: | Játtan: | Slag av íløgu: |
|---|---|---|---|---|
| 22.03. 2018 | Íløga í Stropan | 229.000,00 | Meirinntøka | Íløga |
| 21.06.2018 | Íløga í Vesturstovu | 146.000,00 | Mierinntøka | Íløga |
| 21.06.2018 | Íløga í Vesturstovu | 134.000,00 | Meirinntøka | Rakstur |
| 27.09. 2018 | Íløga í nýtt ruskøki | 1.200.000,00 | Meirinntøka | Íløga |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 25.10.2018 | Byggibúning Bøvegur | 3.000.000,00 | Innistandandi | Íløga |
| 29.11. 2018 | Rakstur sløkkiliðið | 125.000,00 | Meirinntøka | Rakstur |
| 29.11.2018 | Rakstur sløkkiliðið | 175.000,00 | Meirinntøta | Rakstur |
| | **Eykajáttanir tils.** | **5.009.000,00** | | |

***Útgreiningar av eykajáttanunum:***

| **Øki:** | **Tekstur:** | **Upphædd:** | **Viðmerkingar:** |
|---|---|---|---|
| Øki 2 | Almanna- og heilsumál | 280.000,00 | Vesturstova |
| Øki 3 | Børn og ung | 229.000,00 | Stropin |
| Øki 6 | Teknisk mál | 3.000.000,00 | Byggibúning Bøvegur |
| Øki 7 | Kommunal virki | 1.500.000,00 | Ruskøki/sløkkiliðið |
| | Eykajáttanir íalt | 5.009.000,00 | |

Roknskapurin vísir eitt avlop av gjaldføri frá rakstri á kr. 1.233.000,00 móti einum avlopi upp á kr. 16.889.000,00 sambært góðkenda roknskapinum fyri 2017.

Sambært høvuðsyvirliti í roknskapinum eru útgreiningarnar sýndar niðanfyri og samanhildnar í mun til góðkendu fíggjarætlanina við framdum eykajáttanum og umflytingum í árinum netto. Tó framgongur fíggingin ikki av eykajáttanunum, lántøku, nýtsla av innistandandi vm. í yvirlitinum.

| | **Kontoheiti:** | **Roknskapur:** | **Fíggjarætlan** | **Munur +/-** |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Kommunal fyrisiting | 10.246.000,00 | 9.585.000,00 | -661.000,00 |
| 2 | Almanna- og heilsumál | 22.183.000,00 | 21.904.000,00 | -279.000,00 |
| 3 | Børn og ung | 13.164.000,00 | 14.161.000,00 | 997.000,00 |
| 4 | Undirvísing | 4.766.000,00 | 3.035.000,00 | -1.731.000,00 |
| 5 | Mentan og frítíð | 7.149.000,00 | 6.446.000,00 | -703.000,00 |
| 6 | Teknisk mál | 7.317.000,00 | 5.881.000,00 | -1.436.000,00 |
| 7 | Kommunal virki | -6.260.000,00 | -5.251.000,00 | 1.009.000,00 |
| 1-7 | | **58.565.000,00** | **55.761.000,00** | **-2.804.000,00** |
| | **Íløgur:** | | | |
| 1 | Kommunal fyrisiting | 336.000,00 | 425.000,00 | 89.000,00 |
| | Almanna- og heilsumál | 159.000,00 | 186.000,00 | 27.000,00 |
| | Børn og ung | 486.000,00 | 459.000,00 | -27.000,00 |
| | Undirvísing | 19.095.000,00 | 26.400.000,00 | 7.305.000,00 |
| | Mentan og frítíð | 1.465.000,00 | 12.400.000,00 | 10.935.000,00 |
| | Teknisk mál | 3.063.000,00 | 7.780.000,00 | 4.717.000,00 |
| | Kommunal virki | 4.910.000,00 | 4.847.000,00 | -63.000,00 |
| | **Økið 1-7 tilsamans** | **29.514.000,00** | **52.497.000,00** | **22.983.000,00** |
| | **§1 - § 7 tilsamans** | **88.079.000,00** | **108.258.000,00** | **20.179.000,00** |
| | **§ 20 Inntøkur** | **89.312.000,00** | **83.343.000,00** | **5.969.000,00** |
| | **Gjaldføri frá rakstri** | **1.233.000,00** | **24.915.000,00** | **26.148.000,00** |

Fíggingin sambært góðkendu fíggjarætlanini fyri 2018 útyvir skattainntøkur – rentuútreiður/rentuskatt § 20 vm. á kr. 89.312.000,00 er framd við kr. 16,7 mió lántøku, somuleiðis sum nýtslan av innistandandi varð mett til kr. 14,7 mió. og ikki nýtt, grundað á minni nýtslu av íløgum.
Tó er staðfest, at við tað at samlaða nýtslan sambært roknskapinum á íløgusíðuni varð væl minni enn mett, so hevur hetta eisini ávirkað gjaldførið positiva vegin.

Hinvegin eru avdráttirnir av lánum staðfestir til kr. 3.168.000,00 móti kr. 3.528.000,00 í 2017, sum eru kr. 3.332.000,00 minni enn mett í fíggjarætlanini, har avsettar vórðu kr. 6.500.000,00 í ætlanini.

Íløgurnar eru annars útgreinaðar á blaðsíðu 377 í grannskoðarafrágreiðingini.

Lántøka er, sum omanfyri nevnt framd í 2018 upp á kr. 16,7 mió, til fígging av kommunalum íløgum, tó fyri mesta partin í sambandi við nýbygging av barnaskúlanum, sum eftir ætlan er mettur til kr. 101,0 mió. + umbyggingina av FK bygninginum kr. 3,0 ella tilsamans kr. 104,0 mió. Talan er um játtan til íløgur undir „øki 4".

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini 12. apríl 2019, og mælir nevndin einmæld býráðnum til at góðkenna grannskoðaða roknskap kommunununar fyri 2018 uttan viðmerkingar.

***Avgerð mál nr. 10/2019: Tilmælið frá fíggjarnevndini varð samtykt. (9-0). Sostatt er grannskoðaði roknskapurin fyri kommununa fyri árið 2018 samtyktur uttan viðmerkingar. Roknskapurin og grannskoðarafrágreiðingin vórðu undirskrivað á fundinum.***

## Mál nr. 11/2019.
## Mál viðv. Keyp av lendi við Innandalsveg

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur góðkent, at økið niðan fyri endan av Innandalsvegi verður útlagt til bústaðarøki. Áðrenn bygt verður á økinum er neyðugt, at útstykkingin verður gjørd byggibúgvin, s.s. kloakkir, vatn, el, telefon, og at hesin partur av Innandalsvegnum verður gjørdur sambært vegaplanin.

Vísandi til kostnaðarmeting frá teknisku deild so kemur byggibúning av hesum av at verða umleið kr, 1.250.000,00.

Tá ið kommunan skal gera hesa íløgu mælir tekniska nevndin til á fundi 04. apríl 2019, at hendan útstykking verður gjørd sum kommunal útstykking soleiðis, at møguleiki er at byggja á økinum, tá ið byggibúgvingin er gjørd, og økið ikki kemur at liggja óbygt í langa tíð.

Mælt verður somuleiðis til, at kommunan heitir á eigararnar um at selja kommununi øki til hesa útstykking. Samlaða víddin er umleið 6.100 m2 , og tá ið kommunan keypir tílík lendi fyri kr, 110,-/m2 verður keypsprísurin umleið kr. 671.000,00.

Tá peningur ikki er avsettur í fíggjarætlanini fyri ár 2019 til hesa útstykking samtykti nevndin at heita á fíggjarnevndina/býráðið um eykajáttan uppá kr. 671.000,00 til keyp av lendi til hesa útstykking.

**Málið hevur verið fyri á fíggjarnevndarfundi 12.04.2019. Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku nevndini soleiðis, at økið, við eini samlaðari vídd á 6.100 m2,**

**verður keypt fyri kr. 110,00/m2, tilsaman kr. 671.000. Fíggjarnevndin mælir til at fíggja keypið við peningi, sum er avsettur til íbúðarbygging í fíggjarætlanini 2019, har peningur er tøkur.**

***Avgerð mál nr. 11/2019: Tá hetta mál varð viðgjørt og avgreitt fóru Sonni á Horni og Eyðun á Lakjuni av fundinum vegna ógegni. Tilmælið frá teknisku nevndini og fíggjarnevndini varð samtykt soleiðis at keypið á kr. 671.000 verður fíggjað við peningi, sum er avsettur til íbúðarbygging í fíggjarætlanini 2019. (7-0).***

**Mál nr. 12/2019.**
**Umsókn frá Havsbrún um byggiloyvi til kókihøll.**
Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá FORMO, dagfest 04. apríl 2019, har teir vegna Havsbrún biðja um byggiloyvi til kókihøll á matr. nr. 239a í Fuglafirði.

Brunaleiðarin og býarverkfrøðingurin hava gjøgnumgingði brunatilfarið í umsókninni og er niðurstøðan, at neyðugar ásetingar viðvíkjandi brunatrygd eru yvirhildnar. Teir mæla til, at ABA (Automatirk brandalamsystem) verður í bygninginum.

Viðvíkjandi ljóðbjálving so fyriliggur ein fyribils frágreiðing frá ljóðkønum ráðgeva.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini 04. apríl 2019 og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi verður givið til bygging sambært fyriliggnjandi umsókn soleiðis, at ABA ávarðingarskipan verður í bygninginum og bygningurin verður ljóðbjálvaður soleiðis, at krøv viðvíkjandi larmi verða yvirhildin. Kommunan skal hava skjalprógv (dokumentasjón) fyri, hvussu hetta verður loyst.

Hvussu ferðsluviðuskiftini verða loyst í byggitíðini verða havnamynduleikarnir at taka støðu til.

## *Viðgerð og tilmæli frá vinnunevndini 09. apríl 2019:*

Í samband við hesa bygging er neyðugt at tryggleikin viðvíkjandi. ferðslu hevur hægstu raðfesting. Í hesum sambandi og framyvir eigur øll tann lætta ferðslan at verða løgd niðan fyri Havsbrún og nýggju fóðurgoymsluna umvegis fóðurkajina.
At klæða útsíðuna, asfaltera vegøkið verður av teknisku deild mett at kosta umleið kr. 550.000,00. Vinnunevndin vil tí heita á fíggjarnevndina um eina eykajáttan uppá hesa upphædd.

Tá ið roknað verður við, at byggiarbeiðið byrjar í august 2019 eigur hetta arbeiðið at verða gjørt áðrenn summarferiuna.

Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku nevnd soleiðis at ferðsluviðuskiftini verða loyst í samráð og eftir ávísing frá havnamynduleikunum.

**Málið hevur verið fyri á fíggjarnevndarfundi 12.04.2019. Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum og ásetingum í málinum frá teknisku nevndini.**
**Fíggjarnevndin mælir til, at projektið verður fíggjað við peningi, sum er avsettur á RS 751 í kommunalu fíggjarætlanini fyri 2019, har peningur enn er tøkur.**
**Málið hevur verið fyri á býráðsfundi 25.04.2019**

***Avgerð mál nr. 12/2019: Tilmælið frá teknisku nevndini og fíggjarnevndini varð samtykt soleiðis at projektið verður fíggjað við peningi, sum er avsettur* á RS 751 í kommunalu fíggjarætlanini fyri 2019, har peningur enn er tøkur. *(8-1). Árant Berjastein atkvøddi ímóti uppskotinum.***

**Mál nr. 13/2019.**
**Broyting útstykkingarætlan við Bøveg.**

Byggifyritøka hevur vent sær til kommununa við eini ætlan at byggja tvíhús á matr nr. 211v omanfyri Bøveg og møguliga eisini á matr. nr. 211x, somuleiðis sum privatpersónur eisini hevur víst áhuga at byggja tvíhús á matr. nr. 211u.

Samb. ásetingar í byggisamtyktini skal grundstykkjastøddin til tvíhús ikki verða minni enn 300 m2 fyri hvørt av húsunum. Tá ið støddin á hesum er millum 500 og 510 m2 er neyðugt at víðka hesi soleiðis, at tey verða 2 ferðir 300 m2 i hvør sínum matrikulnummar og frábýtt til tveir matriklar.

Tekniska nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 18. mars 2019, og metir nevndin tað verða ein fyrimunur, at grundstykkini verða gagnnýtt í mesta mun, og mælir tessvegna býráðnum til, at grundstykkini verða víðkað og matrikulerað sundur soleiðis, at tey hava eina stødd á umleið 300 m2.

**Málið hevur verið fyri á fíggjarnevndarfundi 12.04.2019. Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum og ásetingum í málinum frá teknisku nevndini.**

***Avgerð mál nr. 13/2019: Tilmælið og ásetingarnar frá teknisku nevndini og fíggjarnevndini varð samtykt. (9-0).***

**Mál nr. 14/2019.**
**Mál viðvíkjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri ár 2020.**

Mentamálanevndin hevur á fundi 03.04.2019 viðgjørt fíggjarætlanina fyri Fuglafjarðar bókasavn. Fyri árið 2020.
Tað er ein samd mentamálanevnd sum tekur undir við fíggjarætlanini, fyri Fuglafjarðar bókasavn og ein samd mentamálanevnd sum mælir til at býráðið somuleiðis tekur undir við fíggjarætlanini fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2020.

Sambært fíggjarætlanaruppskotinum uppá kr. 1.220.000 verður roknað við kr. 675.000 til lønir, kr. 175.000 til húsaútreiðslur, kr. 135.000 til bókakeyp, kr. 20.000 til innbúgv og kr. 215.000 til aðrar útreiðslur.

***Avgerð mál nr. 14/2019: Tilmælið frá Mentamálanevndini varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og einari blankari atkvøðu. Blankt atkvøddi Kristian Petersen.***

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 22,30

Eivin Breiðaskarð

Kristian Petersen

Árant Berjastein

Magni Herason Jøkladal

Ólavur Larsen

Eyðun á Lakjuni

Sigurð S. Simonsen

Edva Jacobsen

Sonni á Horni

Skrivari:

Marin Sólheim Thomsen